# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Atlants Kolvetni nýtt blóð

Føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni hevur fingið nýtt blóð í æðrarnar. Helvtin av nevndini er nýggj og er ein stjóri aftrat settur í leiðsluni. Hvørt hetta boðar frá góðum ella ikki kann bert tíðin vísa. Men tey og teir, sum hava lagnuna hjá felagnum í sínum hondum, fíggingarstovnar serstakliga, hava viljað hetta so, og tí mugu vit velja at trúgva, at hetta er tað besta, sum kann henda fyri felagið og mongu partaeigarar tess.

Tað var eftir, at felagið kom í tungan sjógv í sambandi við lækkandi oljuprísir serliga, at røringur kom í millum íleggjarar og fíggingarstovnar. Neyvan nakar ynskir, at hetta felagið, ið so nógvir føroyingar hava sett sín sparipening í og sum kann fáa stóran týdning fyri føroyskt vinnulív í framtíðini, skal fara niður við flagginum. Felagið hevur síðani byrjan ment ein førleika, sum ein komandi føroysk oljuframtíð avgjørt hevur brúk fyri og er felagið frá at vera leitifelag burturav eisini vorðið til eitt framleiðandi oljufelag. Hetta kunnu vit øll bara fegnast um. Nevnd, leiðsla og starvsfólk hava gjørt sítt ítarsta til at fáa hetta at eydnast, tó at tað ikki bara er sum at siga tað at vera partur í tí ógvusligu og pulserandi oljuverðini.

Tíðir broytast, umstøður broytast. Hetta ger eisini, at krøvini til førleikar og faklig innlit broytast og er neyðugt at laga seg eftir broyttu umstøðunum. Tað hevur so verið hildið rætt og skilagott at fáa fakfólk á fíggjar- og oljuøkinum inn í bæði nevnd og leiðslu.

Í Sosialinum í dag er samrøða við nýggja nevndarformannin í Atlants Kolvetni, sum hevur eina fíggjarliga bakgrund. Uttan iva ein skilagóð avgerð, tí tað, sum í løtuni umrædur hjá felagnum, er at fáa tryggari fíggjarlig viðurskifti undir felagið. Tíðin fer at vísa, um hesin maðurin er rætta svarið. Vit velja so at trúgva tí og seta vón til, at hann megnar at flyta felagið, sum so nógvir føroyingar eiga í, tann rætta og trygga vegin. Vit halda tað eisini vera skilagott, at tað eru komin virkin oljufólk inn í nevnd og leiðslu. Hetta tykist vera ein góð kombinatión, also ein skilagóð strategisk íløga.

Áhugavert verður komandi vikurnar at fylgja arbeiðinum hjá nýggju nevndini og leiðsluni í felagnum. Sum skilst so eru kreditorarnir vælviljaðir og ber til við eini nýggjari nevnd í felagnum at byggja tryggari brýr millum tað og fíggjarstovnar, so er eitt týðandi stig tikið og rokkið. Eftir tað kunnu so skapandi og entusiastisk oljufólk sleppa at brúka evni og royndir at seta síni fingramerki í menningina av felagnum. Neyvan nøkur løtt uppgáva, men heldur ikki ómøgulig. Her veldst eisini um hvønn og hvussu stóran dent tú leggur á at arbeiða saman við øðrum. Einsmallur kanst tú koma langt, men tú megnar ikki at røkka langt inn í framtíðina uttan samstarv. Hetta verður enn ein týðandi avbjóðing hjá felagnum. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## Stýrið við skilið!

JÓGVAN PHILBROW



**Væntandi politisk mál og mið yvir fleiri áramál og fleiri samgongur eru orsøkin til, at búskaparstøðan er sum hon nú er.**

Tá fíggjarkreppan rakti heimin, í november í fjør, fingu politikararnir eitt gott høvi at geva henni skyldina fyri búskaparstøðuna í landinum. Veruleikin er ein heilt annar, fíggjarkreppan hevur, í mun til onnur lond, sera lítla ávirkan á okkara búskap. Veruligi trupulleikin er og hevur verið væntandi politisk kós og væntandi hugsjónir.

Fyrsta ABC samgongan setti gongd í okkurt positivt, nevniliga arbeiði við "Visjón 2015", tó bleiv úrslitið sum vænta – ætlanin var løgd aftast í niðastu skuffu – eingin hevur sæð nakað til hana síðani.

Hugsjónirnar ið vóru í "Visjón 2015" ætlanini vóru, á nógvum økjum, frambrot í mun til verandi støðu, men í dag kunnu vit bert staðfesta at ilt er at fáa eyga á nakra broyting í førda politikkinum. Í staðin hava sparingar innan almennar tænastur og veitingar verið eyðkenni fyri tíðina eftir "Visjón 2015". Serliga hava sparingar innan serstovnar og tænastur, til okkara veikastu borgarum, verði ein "trend" hesi seinastu árini.

Spurningar ið liggja eftir eru

- hvat skal til fyri at fáa samfelagið á føtur aftur
- hvat er tað fyri eitt samfelag ið vit vilja hava?

Skulu vit halda fram við samfelagnum har ið búskapurin stendur í miðdepilin, har ið vit øll verða vigaði í mun til kapital virði, ið tí vit framleiða, við skipanum gjørdar at verja kapitalin hjá nøkrum fáum, har ið vit menniskju bert skulu leggja okkum inn undir skipanina og góðtaka at kapitalurin stýrir?

Ella skulu vit miða móti einum samfelagið ið setur menniskja fyrst, har ið øll hava sama grundleggjandi virði, har ið vit tillaga skipanina soleiðis at hon tænir menniskjanum ið her býr?

Er tíðin ikki komin at vit seta okkum niður og royna at finna útav hvat fyri samfelag vit skulu hava? Eitt samfelag fyri tey fáu og sterku ella eitt samfelag ið er ríkað av fjølbroytni og virkisfýsni, har øll sleppa at luttaka?

## Har ið merkini veittra, veittri eisini mítt

REGIN EIKHÓLM



**34 Gullmerkir, 23 Silvurmerkir og 24 Bronsumerkir**

Har ið merkini veittra, veittri eisini mítt. Soleiðis byrjar seinna ørindi av okkara flaggsangi: Sjá, tú blánar sum loftið .... (Hans A. Djurhuus 1883-1951, Dimmalætting 6.3.1920). Eitt merki, fleiri merkir. Tað sama er galdandi fyri flest øll vanlig hvørkikynsorð sum í hvørfalli enda við –i. Hjá V.U. Hammershaimb og Jakob Jakobsen, doktara, er merki/merkir enntá við í Anthologi'ini frá 1891. Í móðurmálinum hava vit mong onnur dømir: dømi/dømir, kvæði/kvæðir, petti/pettir, epli/eplir, fylgi/fylgir, øki/økir, tíðindi/tíðindir v.fl.

**Heiðursmerkir**
Nú oyggjaleikirnir hava verið í Álandi, er tað gleðiligt at hoyra hvussu mong heiðursmerkir vit hava vunnið – hjartaliga tillukku við tí. Men til tað ferð eftir ferð verður endurtikið hvussu mong heiðursmerki - ikki merkir - vit hava vunnið, ljóðar hetta bæði kollut og óføroyskt. Hví hesi annars frálíku frásøgufólk ikki tora at brúka føroyska fleirtalsformin merkir, men heldur brúka tann kunstiga fleirtalsformin merki, kann mann bara gita um.

Lingvistiskan førleika
Nú Føroyamálsdeildin í nærmastu framtíð skal útnevna ein nýggjan professara í føroyskum máli, hevði tað verið heppið við einum lingvistiskt orienteraðan málfrøðingi, hvørs høvðusuppgáva skuldi verið at legalisera móðurmálið í skrivt og talu við grundstøði í føroyska / latínska alfabetinum. Tá hevði føroyingurin aftur torað at tosað natúrliga og at brúkt móðurmálið - livandi og fjøltáttað - uttan at óttast fyri at verða happaður.

Søgu-tungu filologarnir, sum hava rátt fyri borgum higartil, hava ikki megnað at seta móðurmálið í fokus, men hava brúkt tað mesta av síni tíð upp á verbalt at útstappa Trónd í Gøtu og hansara fylgisveinar heldur enn at geva gætur hvat okkara livandi Hanus og Janus standa fyri móðurmálsliga.

Annars hjartaliga tillukku við øllum medaljunum – sera flott at vinna so mong merkir!

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.